# Úrslit av góðum andstøðupolitikki

**Stóri vinnarin sambært veljarakanningini er Tjóðveldisflokkurin. Eitt úrslit, sum sambært formanninum kemst av góðum andstøðuarbeiði, har flokkurin hevur markerað seg konstruktivt**

VELJARAKANNING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, fegnast um úrslitið, sum enn einaferð staðfestir støðugu framgongdina hjá Tjóðveldisflokkinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tingmannatalið er óbroytt, og í so máta stendur Tjóðveldisflokkurin í stað sambært kanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin. Men við eini framgongd á 4,1 prosentstig er Tjóðveldisflokkurin tann flokkurin av øllum, sum verður spáddur nógv tí størstu framgondina.

### Ótryggleikin kostar vanliga

Høgni Hoydal, formaður í flokkinum, er sjálvandi væl nøgdur um úrslitið, men hann leggur tó samstundis dent á, at talan "bara" er um eina kanning.

- Hesar hava jú altíð ein innbygdan ótryggleika, og tí er hendan ikki ein staðfesting av politisku støðuni. Men hon tykist lýsa eitt positivt rák fyri okkara viðkomandi.

- Í kanningunum, sum hava verið, hava vit havt støðugt góð úrslit, og tað er sjálvandi nakað, sum eg fegnist um.

- Serstakliga eri eg fegin um gongdina, tá havt verður í huga, at fleiri kontroversiell mál hava verið uppi, sum kunnu elva til ótryggleika. Sambandsflokkarnar – og nú skíri ella allar undir einum – hava jú tann fyrimun, at teir at kalla kunnu skapa sína egnu framgongd, um búskaparliga støðan er ótrygg. Tá vilja fólk ofta halda seg til tað verandi, og tað talar so ikki til okkara fyrimun.

### Gevur íblástur

Spurdur, hvat flokkurin kann nýta eina slíka kanning til, og hvørjar orsøkirnar til vøkru tølini eru, sigur Høgni Hoydal, at hetta fyrst og fremst er tekin um, at leisturin hjá flokkinum er greiður.

- Fyrst og fremst, so gevur hetta okkum íblástur at arbeiða víðari. Vit hava onkursvegna kent tað, sum er tíðin í dag merkt av politiskum dølskni, sum ikki plagar at koma okkum tilgóðar, og tí er úrslitið eitt stórt herðaklapp.

- Ikki minst haldi eg, at hetta eisini sýnir, at veljarin gevur okkum álitisváttan fyri gott andstøðuarbeiði. Vit hava alla tíðina roynt at arbeitt seriøst, og tingfólk okkara hava gjørt eitt sera stórt og gott arbeiði innan at kalla øll málsøki. Bæði til fíggjarlóg, fiskidagabanka og fleiri onnur stórmál. Og hesum vilja vit halda fram við, sigur Høgni Hoydal.

# Trupult at vera sjónligur

**Kári P. Højgaard fegnast um úrslitið av veljarakanningini, sum gevur Sjálvstýrisflokkinum ein tingmann afturat. Eitt úrslit, sum hann eisini heldur er í tráð við veruleikan**

VELJARAKANNING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Kári P. Højgaard er sera fegin um, at ein veljarakanning umsíðir gevur flokkinum framgongd*

Tað var ein bæði bilsin og fegin formaður í Sjálvstýrisflokkinum, sum mikumorgunin fekk at vita, at sambært kanningini hjá Fynd stóð flokkurin til at vinna ein tingsess. Bilsin, tí hetta hendi bara hálvt samdøgur eftir, at Gallup í aðrari kanning hevur spátt flokkin at missa tingumboðanina.

- Ein veljarakanning, sum verður gjørd, áðrenn vallistar og valskrá eru kunngjørd, hevur altíð sínar veikleikar. Ikki minst fyri smáu flokkarnar. Men skal eg vera erligur, so trúgvi eg, at hendan kanningin er meira í tráð við veruleikan, sigur Kári P. Højgaard.

- Trupulleikin hjá einum flokki sum okkara í veljarakanningum er eyðsýndur. Til sjálvt valið standa vit okkum vanliga hampuliga væl í Suðurstreymoy, men við bara einum tingmanni – sum ikki er úr tí økinum – kann hetta skjótt kosta í kanningunum. Tí so leingi sum listin ikki er kunngjørdur, kann veljarin í økinum hava trupult við at identifisera seg við flokkin.

### Valstríðið má skipast

Formaður sjálvstýrisfloksins hevur kanska verið mest markantur seinastu tíðina sum formaður í landsstýrismálanevndini. Ikki minst í samband við stóru handlarnar, sum eru framdir innan fiskivinnuna.

Men sjálvur heldur Kári ikki, at hetta í sjálvum sær er tað, sum hevur tryggjað úrslitið í veljarakanningini.

- Tað er nokk ein blanding av fleiri lutum. Sjálvandi er týdningarmikið at vera sjónligur, og hatta er so ein av pallunum, har vit hava markerað okkum. Men eg rokni við, at tað fyrst og fremst er baklandið í flokkinum og stevnuskráin annars, sum fær fólk at velja okkum.

- Samanum tikið er hetta tó eitt gott herðaklapp, og vit eiga avgjørt at byggja víðari á hetta til komandi løgtingsval. Valstríðið er kanska trupult hjá einum lítlum flokki, sum hevur avmarkaða samskipanarmegi, men vit ætla so at vera tíðliga úti við bæði valskrá og valevnislistum, soleiðis at valevni okkara fáa best møguligan møguleika at markera seg til ta tíð.



# Málið at vinna triða sessin

**Jenis av Rana fegnast um støðugu framgongdina, sum Miðflokkurin hevur havt. Ein framgongd, sum hann heldur, stavar frá eini øktari tilvitan um Miðflokkin**

VELJARAKANNING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

- Hetta eru ófør tøl, og tey stuðla upp undir ábendinginar, sum flokkurin hevur havt í eina tíð. Tey trý-fýra seinastu valini hevur Miðflokkurin havt støðuga framgongd, og hetta styrkir um vónina at røkka málinum, sum er at fáa tríggjar tinglimir til komandi løgtingsval.

Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, tykist væl nøgdur um úrslitið av veljarakanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin. Seinastu tíðina, og ikki minst í dag, hava tað verið etisku málini, sum ofta hava sett flokkin í fokus, men Jenis heldur tó ikki, at tað fyrst og fremst eru hesi, sum hava ført framgongdina við sær.

- Tekur tú aktuella málið, so er hetta so ikki nakað, ið er reist av okkum. Her royna vit bara at gera okkara skyldu.

Men Miðflokkurin hevur verið sera avgjørdur, tá etiskir spurningar hava verið reistir?

- Jú, men hesir eru bara ein liður av fleiri í politikkinum hjá okkum.

- Eg hevði væntað, at vit høvdu eina framgongd, tí tilvitanin um flokkin í veljaraskaraðanum er vorðin størri. Vit hava markerað okkum nógv á sosialpolitiska økinum, har vit hava roynt at verja tey veiku í samfelagnum. Hetta saman við grundhugsjón okkara innan etisku og andaligu/kristiligu virðini trúgvi eg hevur verið størsta orsøkin til framgongdina. Ein framgongd, sum vit bæði vóna og trúgva stendur við, soleiðis at flokkurin kann koma upp á tríggjar limir til komandi løgtingsval.